ALMANNASTOVAN

# Løgfrøðingur til Almannastovuna

Søkt verður eftir løgfrøðingi til Stjórnarskrivstovuna at byrja skjótast tilber.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávurnar verða at:
- ráðgeva og vegleiða leiðsluni í løgfrøðisligum og fyrisitingarligum spurningum
- ummæla uppskot til lógir og kunngerðir
- málsviðgera í ávísum málum
- gera vegleiðingar
- tilevna kunningartilfar til almenningin og starvsfólk á Almannastovuni
- verða partur av tvørfakligum arbeiði á stovninum

**Førleikakrøv:**
Vit sóknast eftir einum umsøkjara, ið hevur
- løgfrøðisligt embætisprógv
- evni at arbeiða sjálvstøðugt og málrættað og ikki er bangin fyri at átaka sær nýggjar og ókendar uppgávur
- góð samstarvsevni
- hegni at orða seg á føroyskum í skrift og talu

**Vit bjóða:**
- starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við fjølbroyttum avbjóðingum
- møguleika fyri fakligari og persónligari menning

**Løn- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, ella Mariu Jacobsen, deildarleiðara á tlf. 35 35 10.

**Umsóknir:**
Umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Almannastovuna**
Att.: Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri
J. Broncksgøta 27
Postrúm 3096
110 Tórshavn

Umsóknarfreist: 26/08-2004 kl. 9.00

HJÁ GUNLEIVI

## Kondittaralærlingur

Søkt verður eftir kondittaralærlingi.

Lærutíðin er 4 ár, harav 35 vikur á tekniskum skúla.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

**Bakaríið hjá Gunleivi**
Tlf. 59 88 38 ella 31 21 61

ALMANNASTOVAN

# Sosialráðgevi

Eitt starv sum sosialráðgevi á økisdeildini í Klaksvík er leyst at seta sum skjótast.

**Arbeiðsuppgávur**
- ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar
- seta í verk fyriskipanir sambært forsorgarlógini
- ráðgeva barnaverndarnevndum
- seta í verk fyriskipanir smb. barnaforsorgarlógini í samstarvi við barnaverndarnevndirnar
- gera tilráðingar í smb. við umsóknir um fyritíðarpensjónir
- annað.

**Útbúgvingarkrøv og royndir**
- sosialráðgevaútbúgving
- royndir innan almenna fyrisiting
- góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- góður málburður í føroyskum, bæði munnliga og skrivliga.

**Um deildina**
Arbeiðsøkið hjá økisdeildini er ráðgeving og vegleiðing í persónligum og forsorgarligum spurningum, og støðutakan til og fyriskipan og avgreiðsla av veitingum og tiltøkum smb. forsorgar- og barnaforsorgarlógunum.

Á deildini arbeiða 5 fólk.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Setanar- og lønarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið - sosialráðgevar eru løntir í bólki 5.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jóan Hendrik S. Samuelsen, leiðara, økisdeildin í Klaksvík, tlf. 457240, ella Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á tlf. 35 35 10.

Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera

**Almannastovuni**
Postmoga 3096
110 Tórshavn

í hendi í seinasta lagi 31. august 2004 kl. 12.00.

# AVLOYSARI



SØKT VERÐUR EFTIR, AVLOYSARA
AT BYRJA 1. SEPTEMBER.

FYRIBILS 1/2 ÁR. SKIFTANDI ARBEIÐSTÍÐIR

SKRIVLIG UMSÓKN
SKAL SENDAST TIL:

**AUTO**
**BOKS 1048**
**110 TÓRSHAVN**

Sosialurin 341800

# Til sølu



Málningur av S.J. Mikines - málaður í 1934 (120 x 88 cm) oljumálningur á lørift verður seldur um nóg høgt boð fæst. Boð undir 40.000 kr. ongan áhuga.

**Myndin kann síggjast eftir avtalu á tlf. 44 77 94 ella 25 42 72**

# Lærari

Søkt verður eftir lærara til Miðvágs-Sandavágs skúla at byrja sum skjótast. Starvið er tíðaravmarkað til hetta skúlaárið.

**Tímatalva:**
10 t. í føroyskum, heimstaðarlæru og miðfirring í 3. flokki
4 t. í týskum í 8. flokki
4 t. í føroyskum í 10. flokki
6 t. í enskum í 7. flokki
2 t. í miðfirring í 5. flokki

Starvið verður lønt sambært galdandi avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir saman við ljósriti av próvskjølum o.ø. skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 30. august 2004

**Miðvágs-Sandavágs skúlastýri**
V/Bjørn Akselsen
FO 360 Sandavágur

# Citroen Berlingo vøruvognur

2.0 HDi, jan. 03. myrkar rútar, sleipikrók, cd box, takboylar, rustviðgjørdur, alufelgur, vetrardekk.

Prísuppskot: 120.000 kr. v/ mvg.

**Tlf. 210 298**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Broyttar upplatingartíðir á kommunalu ruskmóttøkuplássunum

Galdandi frá 1. september 2004

**Endurnýtslan á Hjalla:**
Mánadag-fríggjadag 8-17: Einans vinnuburturkast.
Leygardag 10-17: Einans privatburturkast.

**Jarnplássið á Hjalla:**
Mánadag-fríggjadag 8-16: Einans vinnuburturkast.

**Mold- og tyrvingarplássið í Húsahaganum:**
Mánadag-fríggjadag 8-16: Einans vinnuburturkast.

**Bingjuplássið í Kollafirði (frá 1. oktober 2004):**
Leygardag 13-17: Einans privatburturkast.

Samtykt tann 23. Juni 2004
Tórshavnar kommuna

SNARSKIVAN
www.torshavn.fo

Gallarí Jinx



Hergerð Joensen
Framsýning í august 2004

tel 317101 · jinx@jinx.fo

Sosialurin 341800

# Hús í Tórshavn til sølu

á Bjarnoyarvegir 19. Byggiár 1976, grundøki 499 m².

**Tlf. 422313 ella 221322**

# BADMINTON

Vit byrja aftur mikudagin 1. september.
Tilmelding fer fram við at møta
til niðanfyrinevndu tíðir

**Børn á byrjunarstøði, árgangur 96 og 97 (U9)**
*Mánadagar kl. 16.00 - 17.00*
**Børn á byrjunarstøði, árgangur 94 og 95 (U11)**
*Mánadagar kl. 17.00 - 18.00*
**Børn á byrjunarstøði, árgangur 92 og 93 (U13)**
*Mikudagar kl. 16.15 - 17.15*
**Børn á byrjunarstøði, árgangur 90 og 91 (U15)**
*Mikudagar kl. 17.15 - 18.15*

**Børn, vand, árgangur 94 og 95 (U11)**
*Týsdagar og/ella hósdagar kl. 15.30 - 16.30*
**Børn, vand, árgangur 92 og 93 (U13)**
*Týsdagar og/ella hósdagar kl. 16.30 - 17.30*
**Børn, vand, árgangur 91 og eldri (U15+U18)**
*Týsdagar og/ella hósdagar kl. 17.30 - 19.00*
**Elituspælarar**
*Týsdagar og hósdagar kl. 19.00 - 21.00*

**Motiónistar**

GEVIÐ GÆTUR
Í ár skal banaleigan gjaldast frammanundan. Útleigan fer fram 1.- 8. september kl. 19-20 í høllini. Fyrru vikuna hava tey sum leigaðu í fjør, framíhjárætt at leiga sama bana aftur.

Mánadagar kl. 18.00 og úteftir
Týsdagar kl. 21.00 og úteftir
Mikudagar kl. 18.15 og úteftir
Hósdagar kl. 21.00 og úteftir
Sunnudagar kl. 15.00 og úteftir

AÐALFUNDUR
Aðalfundur verður í høll felagsins mánadagin 13. september kl. 20.00. Skrá sambær viðtøkum felagsins, og val av tveimum nevnarlumum

Prísir, limagjøld v.m. eru at síggja á heimasíðu okkara:www.hbf.fo

**Badmintonfelagið í Havn**
**telefon 322515 · hbf@hbf.fo**

KEYP SPORTSFELGUR...




...við dekkum á alnótini

WWW.NORMEK.FO
FO-512 NORÐRAGØTA
TEL 44 20 02 · FAX 44 20 22

# DVEYLAN
**Gólv- og vegg vask**



- Vinyl
- Linolium
- Flísar
- Teppir
- Veggir

**J.C. Svabosgøta 50**
**100 Tórshavn**
**Tlf. 31 41 75**

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

# Tofta skúli

Søkt verður hervið eftir einum lærara og einum stuðuli.

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir lærara til Tofta skúla. Starvið, sum er fulltíðarstarv, er tíðaravmarkað frá uml. 6. september 2004 og 28 vikur fram.

Tað er ein fyrimunur at viðkomandi kann undirvísa 5. og 6. flokki í enskum. Hondarbeiði og heimkunnleika í 6. flokki, og næmingum við serligum tørvi.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4

Eisini verður søkt eftir stuðuli til næming við serligum tørvi 9 tímar um vikuna. Starvið er tíðaravmarkað til tíðarskeiðið frá uml. 6. september 2004 og skúlaárið út.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi týsdagin 30. august 2004.

Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at tosa við skúlaleiðaran, telf. 447332.

**Skúlastýrið fyri Tofta skúla**
v/ Jóhannus Danielsen
650 Toftir

SJÓVAR KOMMUNA

# Søkt verður eftir fólki

til bygdarhúsið á Strondum at byrja sum skjótast.

Tann, ið settur verður, skal taka sær av rakstrinum av húsinum, m.a. matstovuni, reingerð og útleigan av hølum.

Løn samb. avtalu.

Møguligar umsóknir skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 31. august 2004.

**Sjóvar kommuna**
490 Strendur

# Arbeiðshandskar
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820